Føroya Skipara- og Navigatørfelag, Smærugøta 9A,
FR-100 Tórshavn.Tlf.316973. Fax 318516. fsn@fsn.fo www.fsn.fo

Tórshavn tann 03-12-2020

Hoyringsskriv

LM-030/2020 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild, svartkjafti og botnfiski í 2018, 2019 og 2020 og botnfiski í Barentshavinum í 2020

Føroya Skipara - & Navigatørfelag (FSN) Hevur hesar viðm.

Vit hava lisið nevnda uppskot og viðmerkingarnar til lógaruppskotið og uppritið / Almennar viðmerkingarnar.

Føroya Skipara-& Navigatørfelag hereftir nevnt (FSN) skal gerða vart við, at FSN tekur á ongan hátt undir við nøkrum slag av tilfeingisgjøldum sum verða trekt av frá skipara við manning.

FSN er av tí fatan, at rættindahavarin / kvotueigarin - røttindahavarar / kvotueigarar, sum eiga og hava rættindi til kvoturnar, eiga at rinda alt veiðuavgjaldið/ tilfeingisgjaldið.

FSN hevur eisini viðmerkingar til:

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.4 FSN tekur ikki undir við kilogjaldi 2021

1.5 FSN mælir til, at betri tíð verður givin/ latin til at koma við hoyringsskrivið.

Kapittul 2. Avleiðingar fyri uppskotinum

2.1 Tað er sjálvandi altíð ringt at meta um inntøkur, og ikki minst í hesum tíðum " COVID"

2.2 FSN er av tí fatan, at veiðuavgjaldið hevur sera stóra negtiva ávirkan á fyri kommunurnar, sum hava nógv sjófólk skrásett.

2.6 Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

Her stendur at: *Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.*
FSN vil vísa á, at fólk sum starvast umborð á fiskiskipum er ein samfelagsbólkur, sum verður nógv harðari raktur enn onnur starvsfólk á arbeiðsmarknaðinum, tí hetta avgjaldið / eyka skatturin verður trektur av frá einum ávísum samfelagsbólki.

2.11 Skattir og avgjøld

Har tað stendur: *ásetir veiðigjald, sum skal rindast av teimum eigarum av fiskiførðum undir Førouskum flaggið, í hava fiska Makrel, norðhavssild og svartkjaft í 2018, 2019, 2020 og 2021 og botnfisk í Barentshavinum í 2020 og 2021. Við uppskotinum verður veiðugjaldið í 2021 kr. 1,50 fyri hvørt fiska kilo av Makrel , kr 0,60 fyri norðhavssild. Kr. 0,25 fyri svartkjaft og kr. 0,50 fyri botnfisk.*

FSN vil vísa á, sum uppskotið er orða, so er tað eingin ivi, at rættindahavarin eigur at rinda alt gjaldið.

Vegna
Føroya Skipara- & Navigatørfelag
Annfinnur Garðalíð
Formaður